Bara tvær kommunur vilja lækka skattin

Justinus Leisson Eidesgaard

Av teimum 43 kommununum i landinum hava bert tvær valt at lækka skattin niður um 16 prosent. Hetta er loyvt nú, eftir at kreppulógin frá 1993 er sett úr gildi.

Stríðið um kommunuskattaprosenti hevur verið drúgvt og nógv umtalað seinastu árini. Tá kreppan herjaði í fyrru helvt av ntítiárunum, var lóggivið, at kommununrnar ikki kundu seta skattaprosentið niður um 16 prosent.

Síðan hava fleiri kommunur víst á, at 16 prosent er ov mikið og at tær kunnu klára seg við minni. Nú er so lógin broyttt, soleiðis at skattaprosentin kann fara niður um 16 prosent, men hesum hava bert tvær kommunur tikið av. Tað er Gjáar Kommuna, íð hevur verið ein forsprákari fyri lægri skattaprosentið og so Bíggjar Kommuna, sum er komin niður á 15,70 prosent.

- Gjáar Kommuna hevur ikki brúk fyri meiri pengum. Síðan kreppuna í 1993, hava vit fingið meira inn enn vit hava brúkt og tí halda vit tað er rætt at seta skattaprosentið niður aftur á tað støðið, sum tað var áðrenn kreppuna, sigur Sofus Johannesen, borgarstjóri við Gjógv.

- Vit hava javna inntøku í kommununi, her eru eisini nógvir pensionistar við kríggjpensión og tað hjálpir væl til. Vit hava gjørt nakrar íløgur seinastu árini og okkara íløgukvota er brúkt, tí er ikki neyðugt við so høgum skattaprosenti, sigur Sofus Johannesen

23 prosent hægst

Tað er dýrt at búgva í Oyndarfirði og á Sandi. Onga aðrastaðni í landinum verða fólk so knokkroytt av skatti. Her er skattaprosentið 23 prosent. Men dýrast er at búgva við Oyndarfirði, tí er her barnafrádrátturin bert 2000 krónur, á Sandi er hann 500 krónur hægri.

Hetta merkir, at tær krónur sum tú vinnir yvir 150.000 krónur á Sandi og í Oyndarfirði verða skattaðar við 60 prosentum, meðan sama inntøka verður skattað við 50 prosentum við Gjógv. Tá er barnafrádrátturin ikki tikin við.

Barnafrádrátturin svingar frá 2000 til 6000 krónur. Í Mykinesi og við Gjógv er hann 6000 krónur. Í Havn er hann 4000 krónur og í Klaksvík er hann 3500.

Skattaprosentið í Havn er 18,75 meðan tað í Klaksvík er 20 prosent.

Kommunuskattaprocent 2002:				2001:			Munur		
	Komm.sk.%	Kirkjusk.%	Barnafr.	Komm.sk.%	Kirkjusk.%	Barnafr.	Komm.sk.%	Kirkjusk.%	Barnafr.
Fugloyar	16,00	0,30	3.500	16,00	0,30	3.000	0,00	0,00	500
Svínoyar	16,00	0,30	4.500	16,00	0,30	4.500	0,00	0,00	0
Viðareiðis	21,50	0,30	3.500	21,50	0,30	2.500	0,00	0,00	1.000
Hvannasunds	19,00	0,30	3.500	19,00	0,30	3.500	0,00	0,00	0
Klaksvíkar	20,00	0,30	3.500	20,00	0,30	3.000	0,00	0,00	500
Kunoyar	16,00		3.500	16,00		3.000	0,00	0,00	500
Mikladals	16,00	0,30	3.000	16,00	0,30	3.000	0,00	0,00	0
Húsa	17,00	0,30	4.000	17,00	0,30	4.000	0,00	0,00	0
Oyndarfjarðar	23,00	0,30	2.000	23,00	0,30	2.000	0,00	0,00	0
Elduvíkar	22,00	0,30	4.400	23,00	0,30	4.400	-1,00	0,00	0
Fuglafjarðar	18,90	0,30	3.500	19,12	0,30	3.200	-0,22	0,00	300
Lorvíkar	22,00	0,30	4.000	22,00	0,30	3.000	0,00	0,00	1.000
Gøtu	18,50	0,30	4.000	18,50	0,30	4.000	0,00	0,00	0
Nes	19,90	0,30	4.000	19,90	0,30	3.500	0,00	0,00	500
Runavíkar	19,95	0,30	2.750	20,00	0,30	2.500	-0,05	0,00	250
Sjóar	18,00	0,30	3.000	17,00	0,30	2.500	1,00	0,00	500
Skála	19,95	0,30	2.750	20,35	0,30	2.500	-0,40	0,00	250
Eiðis	16,75	0,30	3.500	17,00	0,30	3.000	-0,25	0,00	500
Sunda	16,50	0,30	5.000	16,50	0,30	5.000	0,00	0,00	0
Funnings	16,00	0,30	5.000	16,00	0,30	4.000	0,00	0,00	1.000
Gjáar	13,00		6.000	16,00		6.000	-3,00	0,00	0
Haldórsvíkar	19,00	0,30	4.000	19,10	0,30	3.000	-0,10	0,00	1.000
Saksunar	18,00		2.000	18,00		2.000	0,00	0,00	0
Hvalvíkar	18,80	0,30	4.000	18,80	0,30	4.000	0,00	0,00	0
Hósvíkar	17,50	0,30	3.000	17,00	0,30	3.000	0,50	0,00	0
Kvívíkar	17,00	0,30	3.500	17,00	0,30	3.000	0,00	0,00	500
Vestmanna	21,00	0,30	2.500	21,00	0,30	2.500	0,00	0,00	0
Kirkjubøar	20,50	0,30	3.000	20,00	0,30	3.000	0,50	0,00	0
Hests	17,00	0,30	2.500	17,00	0,30	2.500	0,00	0,00	0
Nólsoyar	17,25	0,30	3.000	17,00	0,30	3.000	0,25	0,00	0
Sandavágs	18,70	0,30	3.500	18,70	0,30	2.500	0,00	0,00	1.000
Miðvágs	21,00	0,30	2.500	21,00	0,30	2.500	0,00	0,00	0
Sørvágs	20,00	0,30	2.500	20,50	0,30	2.500	-0,50	0,00	0
Bíggjar	15,70	0,30	3.000	16,00	0,30	3.000	-0,30	0,00	0
Mykines	16,00		6.000	16,00	0,30	1.500	0,00	-0,30	4.500
Sands	23,00	0,30	2.500	23,00	0,30	2.500	0,00	0,00	0
Skopunar	22,50	0,30	2.500	23,00	0,30	2.500	-0,50	0,00	0
Skálavíkar	18,00	0,30	3.000	18,00	0,30	3.000	0,00	0,00	0
Húsavíkar	20,00	0,30	2.500	20,00	0,30	2.000	0,00	0,00	500
Skúvoyar	16,00		3.000	16,00	0,30	3.000	0,00	-0,30	0
Hvalbiar	19,00	0,30	3.000	19,00	0,30	3.000	0,00	0,00	0
Tvøroyrar	22,50	0,30	3.000	22,50	0,30	3.000	0,00	0,00	0
Fámjins	16,00	0,30	5.000	16,00	0,30	5.000	0,00	0,00	0
Hovs	21,00	0,30	3.000	21,70	0,30	3.000	-0,70	0,00	0
Porkeris	21,00	0,30	3.000	21,00	0,30	3.000	0,00	0,00	0
Vágs	21,75	0,30	2.500	21,75	0,30	2.500	0,00	0,00	0
Sumbiar	18,00	0,30	4.000	18,00	0,30	4.000	0,00	0,00	0
Tórshavnar	18,75	0,30	4.000	18,75	0,30	3.500	0,00	0,00	500
Hægsta	23,00	0,30	6.000	23,00	0,30	6.000	0,00		
Meðal	19,44	0,30	3.517	19,45	0,30	3.165	-0,01		
Lægsta	13,00	0,30	2.000	16,00	0,30	1.500	-3,00		

Trýst elvir til móttrýst á Landssjúkrahúsinum

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum vil ikki geva eftir fyri trýstinum frá sjúkrasystrunum á B 6, tí hon stúrir fyri, at so fara aðrar deildir at gera tað sama

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
Áki Bertholdsen

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum vil ikki bakka fyri trýsti.

Spurningurin um, hvussu nógv starvsfólk skulu vera á B 6 á Landssjúkrahúsinum er eisini ein spurningur um prinsipp.

Av teimum 23 sjúkrasystrunum á B 6 hava nú 18 sagt seg úr starvi og tær fara á nýggjárinum.

Tað einasta, sum kundi fáa tær til at taka uppsagnirnar aftur, var, at fleiri starvsfólk vórðu sett á deildini, tí tær mettu, at arbeiðsbyrðan var ov tung.

Hinvegin sigur leiðslan, at afturímóti líknandi deildum á sjúkrahúsum í Danmark er B 6 miðalgott mannað.

Samstundis sigur hon, at á líknandi deildum á donskum sjúkrahúsum eru í miðal eini 50-60 % av sjúklingunum tungir, røktarkrevjandi sjúklingar og tað er meiri enn tað eru á B 6, ella í hvussu so er, er tað ikki minni.

Men stríðið um B 6 er eisini eitt prinsippmál.

Marin Vang, røktarfakligur leiðari á Landssjúkrahúsinum, sigur, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum vil ikki geva seg fyri trýsti.

Leiðslan óttast, at fáa sjúkrasystrarnar á B 6 eitt úrslit burturúr at leggja trýst á leiðsluna á hendan hátt, fara aðrar deildir at gera tað sama.

Hon sigur, at ein týðandi orsøk til, at leiðslan ikki vil ganga krøvunum hjá sjúkrasystrunum á møti, er, at hon stúrir fyri, at hesin hátturin at leggja trýst á leiðsluna fer at breiða seg til aðrar deildir eisini og so kann leiðslan skjótt missa tamarhaldið á støðuni.

Tí vil leiðslan ikki geva eftir fyri trýsti av hesum slagnum, sigur hon.

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum stúrir fyri, at bakkar hon nú fyri sjúkrasystrunum á B 6, fer hesin mátin at leggja trýst á leiðsluna, at breiða seg til aðrar deildir eisini, sigur Marin Vang, røktarfakligur stjóri á Landssjúkrahúsinum

Prógv um hvussu lítið vit eru virdar

Tær 18 sjúkrasystrarnar á B 6, sum hava sagt seg úr starvi, stúra ikki fyri, at tær fara at ganga arbeiðsleysar serliga leingi

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
Áki Bertholdsen

– Hetta vísir bara, hvussu lítið vit eru virdar.

Ingun Gaardbo, álitisfólk á B 6 á Landssjúkrahúsinum, heldur, at tað er langt úti, at Landssjúkrahúsið nú søkir eftir heilsurøktarum at manna deildina, saman við sjúkrasystrum.

Hetta vísir bara, hvussu lítið leiðslan á Landssjúkrahúsinum virðir okkum, sigur hon.

Higartil hava 23 sjúkrasystrar verið á B 6.

– Tað er uttan iva tí at brúk hevur verið fyri 23 sjúkrasystrum og og ikki øðrum starvsbólkum.

– Fara tey nú at seta starvsbólkar í starv, sum hava lægri útbúgving, er tað heilt týðiligt ein niðurgerðing av okkum, sigur hon.

– Men skal B 6 nú mannast við einum starvsbólki, sum hevur lægri útbúgving, má leiðslan sjálv taka ábyrgdina mótvegis heilsuverkinum og sjúklingunum upp á seg.

Hon sigur, at allar tær 18 sjúkrasystrarnar, sum upprunaliga søgdu seg úr starvi, standa við uppsagnirnar og tær fara 31. desember.

Ingun Gaardbo stúrir ikki fyri, at tær koma at ganga arbeiðsleysar leingi.

Kanska fara tær at bjóða seg fram ígjøgnum eina vikarstovu, ella á annan hátt.

– Tað ber eisini til at gera okkurt heilt annað í eina tíð, til okkurt vísir seg, sigur hon.

Annars heldur hon, at allar tær mongu stuðulsváttanirnar, sum tær hava fingið, áttu at sagt leiðsluni á Landssjúkrahúsinum okkurt.

– Sjálvt læknarnir hava alment boðað frá sínum stuðuli til sjúkrasystrarnar og tað er ikki gamalt á Landssjúkrahúsinum, tá ið hugsað verður um ósemjurnar, sum hava verið ímillum teir ymsu fakbólkarnar á Landsjúkrahúsinum í nógv ár.

At leiðslan á Landssjúkrahúsinum nú vil hava aðrar starvsbólkar, sum hava lægri útbúgving, at manna B 6, vísir, hvussu lítla virðing, hon hevur fyri okkum, sigur Ingun Gaardbo, álitisfólk á B 6

Søkja nú eftir blandaðum fólki

Landssjúkrahúsið søkir nú eftir nýggjari manning til B 6 á Landssjúkrahúsinum fyri tær 18 sjúkrasystrarnar, sum hava sagt upp. Men nú verður ikki bara søkt eftir sjúkrasystrum, tí heilsusøktarar kunnu eisini søkja størvini

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
Áki Bertholdsen

Nú er Landssjúkrahúsið farið at søkja eftir nýggjari manning til B 6 á Landssjúkrahúsinum ístaðin fyri tær 18 sjúkrasystrarnar, sum hava sagt upp.

Men ístaðin fyri at søkja eftir sjúkrasystrum burturav, verður eisini søkt eftir heilsurøktarum, ella almanna- og heilsuástøðingum, ið summi eisini nevna tær.

Higartil hevur B 6 verið mannað við 23 sjúkrasystrum og tveimum sjúkrahjálparum, men nú er sostatt líkt til, at samansetingin skal vera øðrvísi hereftir.

Í lýsingini, sum er í bløðunum í dag, er onki tal sett á, hvussu nógvum fólkum, søkt verður eftir.

– Á B 6 eru fleiri føst størv sum sjúkrasystrar og almanna- og heilsuástøðingar í blandaðum vaktum leys at søkja sum skjótast eftir avtalu, eru boðini í teirri rættiliga drúgvu lýsingini, sum stendur aðrastaðni í blaðnum.

Lagt verður afturat, at talan er um fulltíðarstørv, men at møguleiki er fyri at avtala niðursetta tíð.

Freistin at søkja størvini er úti 2. januar á miðdegi.

Byggjast upp av nýggjum

Almanna og Heilsumálastýrið sigur í lýsingini, at deildin hevur leingi, tó serliga hesa síðstu tíðina, verið merkt av eini truplari hendingagongd, sum hevur fört við sær, at flestu starvsfólkini hava sagt seg úr starvi.

– Tí skal deildin byggjast upp av nýggjum, møguliga við øðrum uppgávum. Tørvur er tí á starvsfólki, sum hava hug og evni at seta í verk nýggj tiltøk.

Higartil hevur B 6 verið ein deild, sum tekur ímóti innkallaðum og akuttum sjúklingum alt samdøgrið. Hon hevur 18 seingjarpláss og hevur fimm sergreinar

Men, nú deildin skal skipast av nýggjum, verða broytingar kanska gjørdar og Almanna- og Heilsumálastýrið væntar, at tey, sum verða sett, tola hetta og við vælviljað verða við at leggja broytingarnar til rættis og fremja tær í verki.